# Væl lønt meiri skatt



Í Danmark fyrireika Sosialdemokratarnir og Sosialistiski Fólkaflokkurin eitt uppskot, sum skal áleggja teimum best løntu donsku skattaborgarunum at rinda meiri skatt enn nú. TV2 visti í gjár at siga, at sambært uppskotinum skulu øll, sum forvinna meiri enn eina millión krónur, rinda fim prosent eykaskatt av tí, sum inntøkan fer upp um ta fyrstu milliónina. Ein tílík broyting fer at raka umleið 20.000 danir. Umframt skattahækkingina ætla Sosialdemokratarnir og SF at avmarka skattafrádráttin fyri prvatar pensjónsuppsparingar. Henrik Dam Kristiansen, sum er skrivari hjá sosialdemokratiska tingbólkinum, váttar fyri TV2, at flokkarnir arbeiða við einum skattauppskoti, men meiri vil hann ikki siga.

# Toskurin givið nógv minni

Tann vánaligi toskaprísurin hevur havt við sær, at norskir fiskimenn hava fingið einar 800 milliónir krónur minni fyri toskin higartil í ár enn í sama tíðarskeiði í fjør. Tað skrivar FiskeribladetFiskaren. Teir fyrstu seks mánaðirnar í ár landaðu norskir fiskimenn 137.000 tons av toski fyri 1,6 milliard norskar krónur. Í sama tíðarskeiði í fjør var nøgdin 144.000 tons, og virðið var 2,4 milliardir krónur. Sostatt var ikki tann stóri munurin á nøgdini, men helvtarmunur á virðinum. Harafturat hava teir norsku fiskimenninir eisini fingið munandi minni fyri hýsuna og upsan higartil í ár enn fyrra hálvár í fjør.

# Dømdur fyri siðamisbrot

**Ein 43 ára gamal maður varð í Føroya rætti í gjár dømdur tríggjar mánaðir fongsulsrevsing fyri at hava gjørt seg kynsliga inn á eina smágentu. Hann varð frídømdur fyri barnaporno, við tað at broytingarnar í føroysku lógini ikki eru komnar í gildi enn**

SIÐAMISBROT
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Hóast maðurin noktaði seg sekan, valdi dómarin í Føroya rætti at trúgva eini smágentu, sum hevði greitt politinum frá, at ein maður í heimbygd hennara hevði gjørt seg inn á hana kynsliga. Tað var hent fyri tveimum árum síðan.

Maðurin varð valdur fongsulsrevsing í tríggjar mánaðir, men hann skal bara inn at sita teir 30 dagarnar. Hinir báðir mánaðirnir eru treytaðir við royndartíð í tvey ár. Tað vil siga, at ger hann einki revsivert í tvey ár, falla teir báðir mánaðirnir burtur.

Maðurin skal gjalda gentuni 10.000 krónur i endurgjaldi, og hann skal gjalda sakarmálsútreiðslurnar.



### Ikki fantasi

Rættarmálið fór fram fyri afturlatnum hurðum, men dómfellingin var almenn, og tá segði dómarin seg vera sannførdan um, at gentan hevði sagt satt. Dómarin segði, at maðurin í rættinum hevði vart seg við, at gentan hevði funnið uppá skuldsetingina, og at politisturin, sum avhoyrdi, hevði manipulerað gentuna, men tað helt dómarin onga grund vera fyri at halda.

Tann 43 ára gamli maðurin varð eisini ákærdur fyri at hava tikið barnapornografiskar myndir niður av netinum, men henda ákæran varð slept.

Orsøkin til tað var, at nakrar ætlaðar broytingar í revsilógini ikki eru komnar í gildi enn. Eftir galdandi lóg skulu børn verða undir 15 ár, um talan skal vera um barnapornografi. Ein onnur treyt er, at myndirnar vísa kynslív.

Myndirnar, sum politiið fann hjá politinum, luku ikki báðar treytir fyri at kunna nevnast barnapornografiskar. Summar myndir vóru av gentum undir 15 ár, men ikki beinleiðis pornografiskar, aðrar myndir vóru pornografiskar, men óvissa var um, hvønn aldur genturnar høvdu.

Maðurin, sum varð dømdur, avgjørdi beinanvegin at kæra dómin við kravi um frídøming. Ákæruvaldið valdi beinanvegin at mótkæra við kravi um harðari revsing.

# Bíligari at liva

**Frá fyrsta til annan ársfjórðing 2009 fór brúkaraprístalið 0,6 prosent niður. Tað er triði ársfjórðingur upp í slag, at brúkaraprístalið lækkar, skrivar Hagstovan**

PRÍSTAL
*Jóanis Nielsen*
*joanis@post.olivant.fo*

Samanborið við annan ársfjórðing í 2008 er brúkaraprístalið lækkað 0,9 prosent.

### Rentulækking

Brúkaraprístalið fór 0,6 prosent niður frá fyrsta ársfjórðingi til annan ársfjórðing 2009, úr 116,1 niður í 115,4. Rentan á íbúðalánum er farin 11,8 prosent niður og hevur mestu ávirkanina á prísfallið.

Eisini prísirnir á nógvum matvørum eru lækkaðir seinasta ársfjórðingin, mest á frukt og grønmeti, sum eru farnir ávikavist 2,3 og 1,7 prosent niður.

Seinasta ársfjórðingin hevur mesti prísvøkstur verið í nýtslubólkinum ymiskar vørur og tænastur, sum eru farnar 2,4 prosent upp. Hesin prísvøkstur stavar frá hækkandi prísum á dagstovnaplássum og tryggingum. Nýtslubólkurin flutningur er farin 1,4 prosent upp, mest tí brennievni til akfør er dýrkað.

### Bíligari brennievni

Annan ársfjórðing 2009 vóru brúkaraprísirnir í miðal 0,9 prosent lægri enn sama ársfjórðing í 2008.

Hóast prísirnir á brennievni til akfør eru hækkaðir seinasta ársfjórðingin, vóru tær annan ársfjórðing 22,7 prosent lægri enn annan ársfjórðing í 2008. Og saman við príslækkingini á brenniolju til húsarhald upp á 36,5 prosent, er hetta meginorsøkin til negativa árliga prísvøksturin.

Frítíð og mentan er farið 1,2 prosent niður, serliga orsakað av lægri prísum á uttanlandsferðum og móttøku- og endurgevingartólum.

Men hóast príslækking hevur verið seinasta árið, eru tað fleiri nýtslubólkar, ið eru vorðnir dýrar.

# Nýggjur politiskur flokkur ávegis

**Ein mótmælisbólkur á Facebook, ið kallar seg »Nær fáa vit nokk« tekur eftir øllum at døma politiskt skap nú**

POLITIKKUR
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Fólkini handan ein nýggjan Facebookbólk, ið kallar seg »Nær fáa vit nokk«, hava eftir øllum at døma fingið nokk nú.

Bólkurin varð stovnaður í apríl mánaði, og gevur bólkurin teimum fólkavaldu og stýrandi í landinum av grovfílini fyri bæði ódugnasemi og rotinskap við meira. Nógv eru løgst afturat bólkinum síðan stovnanina, og eru tað í dag 1.123 limir í bólkinum.

Orðið er frítt í bólkinum, og fólk halda seg ikki aftur við ábreiðslunum, og er enntá ein avrikslisti yvir avrikini hjá politikarunum.

Millum ivasomu avrikini, ið eru listað upp, kunnu nevnast » 1) Hoyvíks-sáttmálin, sum hvørki kann brúkast til eitt ella annað«, »5) Ein fantastiskur undirsjóvartunnul leggur Føroyar lamið í næstan eitt ár«, »10) Fíggjarmálaráðharrin drekkur seg skít í Íslandi.« og » 11) Politikarar renna avstað við møblum, heldur enn at geva teir til t.d. ALV.«

### Mótmæla verandi støðu

Nú hava fyriskiparar handan bólkin tó fingið nokk, og sendu tey, sambært heimasíðuni hjá MESS, í gjár boð til allar limirnar um, at farið er undir at stovna ein politiskan flokk.

Flokkurin er stovnaður sum eitt mótmæli móti støðuni í landinum. Bólkurin vil vera við, at politiska støðan í landinum er fryst føst í klandri, og at politikararnir ikki lurta eftir fólkinum. Á síðuni hjá bólkinum spyrja tey eitt nú, hvørt føroyingar ikki áttu at gjørt »ein Ísland« vísandi til at fólkið har herfyri tvingaði stjórnina frá, og fingu nýval.

Enn hevur flokkurin tó einki navn, og kjakast verður ófort um hetta á Facebook.

Eisini verður kjakast um møguliga manning ella eina endaliga endamálsorðing. Tí biðja tey limir sínar á Facebook siga frá, hvat tey halda er eitt gott navn, hvørji skulu stilla upp, hvat endamálsorðingin skal vera, og yvirhøvur koma við viðmerkingum og hugskotum til nýggja flokkin.